hvørsfall

Fyrisøgn!

Góða dagbók!
Nú má eg aftur skriva í góðu dagbók mína. Eg siti í mínum besta stóli inni á kamarinum og skrivi. Eg eri júst komin aftur úr føðingardegnum hjá Jógvani. Vit høvdu tað stuttligt og fingu nógv gott at eta.

Jógvan vísti mær sítt kamar. Tað var lítið, men vakurt og hugnaligt. Aftaná vísti hann mær bøkur sínar. Honum dámar væl at lesa. Eg lovaði honum at sleppa at síggja mínar bøkur eisini, tí eg eigi fleiri, sum hann ikki eigur.

Eg ætli mær eisini at vísa honum mítt kamar. Tað er eitt sindur størri enn hansara, men hansara er líka vakurt sum mítt.

Okkara hús standa nær við skúlan, so eg fari at biðja hann koma beint eftir skúlatíð í morgin.

Nú má eg fara at leggja bøkur mínar í skúlataskuna og taka klæði míni fram til í morgin. Eg veit, at eg altíð havi so ringa tíð um morgunin.

Hanna